# Vilja finna felagsstev

**Leiðararnir í teimum trimum útnorðurlondunum eru samdir um, at samstarvið teirra millum skal halda fram og útbyggjast. Har tað er møguligt skal verða tosað við einari rødd, men fortreytirnar eru ymiskar**

ÚTNORÐUR
*Heri á Rógvi*

So skjótt sum ríkisfundurin var av, so var klárt til næsta fundin landanna millum. Hesaferð kallaðist fundurin fyri útnorðurfundur. Hesaferð var Anders Fogh Rasmussen skiftir út við Davíð Oddson, íslendski forsætisráðharrin. Hinar báðir vóru, sum áður, Anfinn Kallsberg, løgmaður, og Jonathan Motzfeldt, landsstýrisformaður.

Á fundinum varð tosað um økt samstarv í útnorði í Nordisk Råd, samstarv millum londini í útnorði og grannalond og samstarv avtala millum útnorður londini og Nordisk Råd. Harumframt vórðu eisini hvalaveiða, skattaavtalur og ferðasamband millum londini umrøtt á fundinum.

Eisini kunnaðu teir tríggir um gongdina í hvørjum landi sær – bæði búskaparliga og politiskt.

Burturúr fundinum kom einki konkret. Ikki annað enn, at teir eru allir sum ein sinnaðir at halda fram í samstarvinum, sum teir lagt lunnar undir á øðrum fundum, har teir hava hitst. Arbeitt verður framímóti einum størri parlamentariskum samstarvi, har Ísland, Grønland og Føroya skulu, har tað er møguligt, tosa við einari rødd. Prátið á fundinum var fyri tað nógva yvirordnað.

Bæði Jonathan Motzfeldt og Davíð Oddson vísti á, at teir vóru sera fegnir um høvið at hittast í einum tílíkum høpi. Ætlanin er, at útnorðurfundir av hesum slag skulu vera á hvørjum ári.

### Ymsar fortreytir

Ísland er sjálvstøðugur statur, men Føroyar og Grønland virkað undir einari heimastýrisskipan í tí danska ríkinum. Hetta ger so, at fortreytirnar í stóran mun eru ymiskar fyri londini, tá tað snýr seg um gera samstarv við onnur lond. Á tíðindafundinum eftir útnorðurfundin snúði tað nógva av prátinum seg um ES, og støðuni hjá teimum trimum londunum til ES.

Hvørki Ísland, Grønland ella Føroyar hava limaskap í ES, men øll lond hava okkurt slag av avtalu við ES. Tann hjá íslendingum er tann mest umfatandi. Grønlendingar hava bert eina fiskivinnuavtalu við ES. Føroyar hava afturat einari fiskivinnuavtalu eisini eina handilsavtalu.

Løgmaður vísti á, at útnorður londini ógvuliga illa fáa talað við einari rødd mótvegis ES, tí fortreytirnar eru so ymiskar. Grønland og Føroya fáa í verandi ríkisrættarligari støðu heldur ikki limaskap í EFTA, vísti løgmaður á.

– So leingi fiski vinnupolitikkur er tann, hann er, hjá ES, so kunnu vit ikki gerast limir, segði Anfinn Kallsberg. Hann sipaði til tað sentralu stýringina av fiskivinnuni í ES. Bæði Davíð Oddson og Jonathan tóktust at vera samdur við honum.

Løgmaður vísti á, at tað verður gjørt eitt stóra arbeiði frá sínari umsiting at fáa størri kjak um ES í Føroyum og hjá ES at lurta meira eftir føroyingum. Talan er um eina drúgva prosess, segði løgmaður.

Davíð Oddson vildi ikki gera viðmerkingar til føroyska og grønlendsku sjálvstýrisgongdina.

### Hvalaveiða

Hjá Davíð Oddsyni var stóra evnið á tíðindafundinum hvalaveiða. Hann vísti á, at hvalaveiða var neyðug hjá íslendingum, hóast hon í búskapinum fylti ógvuliga lítið.

– Tað hevur stóran týdning fyri okkum, at vit kunnu halda fram við at veiða hval til matna, ið vit útflyta, segði Davíð Oddson.

Hann fýltist á, at altjóða hvalaveiðunevndin bert tó kenslulig fyrilit, sum hann tók til.



*Alt er gott í útnorði. Tey stóru smílini vóru frammi, og allar eru teir samdir um, at samstarvið skal halda fram og víðkast*
*Mynd: Finnur Justinussen*

## Formansskifti í Unga Tjóðveldinum

**Landsfundur Unga Tjóðveldisins verður hildin leygardagin 24. august kl. 17.00**

LANDSFUNDUR
*Heri á Rògvi*

Undan fundinum er greitt, at nógv nýggj andlit verða at síggja í komandi landsnevndini. Eisini er greitt, at Unga Tjóðveldið fær nýggjan formann, tí núverandi formaður fer burtur í onnur lond í lestrarørindum.

Verandi formaður, sum altso ikki verður formaður eftir fundin leygardagin, er Jóannes V. Hansen. Ikki tí, tað átti at verið spennandi at gerast formaður fyri Unga Tjóðveldið. Millum fyrrverandi formenninar er m.a. Annlis Bjarkhamar, sum í dag er landsstýrismaður. Hon var formaður í felagnum til í fjør, og var hon formaður síðani felagið varð endurstovnað síðst í nítiárunum.

Leygardagin verður landsfundurin hjá Unga Tjóðveldinum hildin í Havn.

Fundur verður hildin í hølum felagsins, Ullvørhúsinum, Kongagøtu 11, leygardagin kl. 17.00. Eftir fundin verður ársveistlan hildin. Unga Tjóðveldið vil fegin síggja so nógv loysingarsinnaði ung á fundinum sum gjørligt.



*Tá Unga Tjóðveldið hevur landsfund leygardagin skal annar formaður finnast fyri Jóannes V. Hansen, sum fer út í heim í lestrarørindum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Skálafólk í annan heim

**Í dag, fríggjadagin, fara 40 fólk umborð á ferðamannaskipið The World**

VITJAN
*Heri á Rógvi*

Í gjár skrivaðu vit um ein ferðamann við stóra og stásiliga ferðamannaskipinum The World. Tað hevur eydnast at savnað um fjøruti fólk í familjuni, og tey fara øll umborð á The World fríggjadagin.

Steðgurin verður ikki langur, tí skipið verður bert í Føroyum í tólv tímar tilsamans. Tað er Tor Shippin, ið er umboð fyri skipið í Føroyum.

Vit skulu í sama viðfangi rætta eina villu, ið kom fyri í greinini í gjár. Skipið hjá Mortani Johannesen, Mortan á Hvannasundi, kallaðist fyri Florence. Tað var hetta skip, ið Hans Petur Jacobsen úr Norðhúsinum á Skála var við. Tað er hann, ið er abbi Per Einar Skaar, sum eigur glæsiliga íbúð umborð á The World.

Tað hevur eydnast okkum at fingið til vega myndir av Per Einari og foreldrum hansara. Myndirnar hava vit fingið frá Paula og Oluffu Mikkelsen á Skála. Oluffa er systkinabarn móður Per Einar, Anna Maria.



*Per Einar Skaar, avmyndaður í Norra fyri nøkrum árum síðani, vil hitta sína familju í Føroyum*



*Her eru foreldrini hjá Per Einari Skaar avmyndaði. Mamman eitur Anna Maria Skaar, og pápin eitur Henning Skaar. Mamman arbeiðir sum lækni í New York*



# Fara nú at leggja seg eftir hýsuni

**– Framleiðslan á flakavirkinum er heldur minni teir 2-3 dagarnar um vikuna, tá ið vit arbeiða gullaks, sigur Albert Ellefsen, virkisleiðari**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Á Fiskavirking í Miðvági fóru tey aftur til arbeiðis, 5. aug. eftir summarsteðgin.

Albert Ellefsen sigur, at væl av fiski hevur verið hesar báðar vikurnar, og tey 100-110 fólkini, sum er »staburin« hjá flakavirkinum, hava havt nóg mikið at gera.

Í síðstu viku keypti virkið lastina hjá Fram og Smaragd; teir høvdu ávikavist 190.000 og 70.000 pund í part, meginparturin upsi.

Hesa vikuna hevur Vesturbúgvin, sum er á gullaksaveiði, landað 210.000 pund í Miðvági. Teir partrola saman við Eysturbúgvanum, sum landar til Tavuna í Leirvík.

Í vikuni hevur virkið eisini keypt nakað av hýsu á uppboðssølu.

Alberg Ellefsen veit eisini at siga, at línuskipið, Sigmundur, skal landa á Toftum mánadagin komandi, og her hevur Fiskavirking í Miðvági keypt hýsuna.

Hósdagin vóru 95 tons av hýsu til sølu á gólvinum á Toftum, men tá ið vit fættu, dugdi Albert ikki at siga, um ein partur av hesum endaði í Miðvági.

### Upsi, gullaksur og hýsa

Albert sigur, at nú virkið hevur keypt og virkað gullaks til fars, hevur heldur minni orka verið nýtt inni á sjálvum flakavirkinum.

– Vesturbúgvin, sum plagar at gera ein túr um vikuna, landar 100 og góð 100 tons hvørja ferð. Tað tekur okkum einar 2-3 dagar at framleiða henda fiskin til fars, og hesar dagarnar arbeiða vit minni av øðrum fiski.

Hann roknar við, at Fiskavirking í Miðvági fer at taka ímóti gullaksi umleið ein mánaða aftrat; so er sesongin liðug.

Prísurin á gullaksi hevur ligið nakað omanfyri 4 krónur fyri kg., men í løtuni er hann heldur lægri.

– Nú fara vit so aftur í størri mun at arbeiða hýsu, og væntandi varar hýsusesongin til einaferð út á várið, sigur Albert Ellefsen, virkisleiðari.



*– Nú hýsusesongin byrjar, fer Fiskavirking í Miðvági í størri mun at arbeiða hýsu, sigur Albert Ellefsen, virkisleiðari*

## Síðsta »skotið« gav ikki nógv

STUÐULSTILTAK
*Vilmund Jacobsen*

Í samband við stuðulssvimjingina um Nólsoyarfjørð seinasta leygardag, skipaði stuðulsnevndin fyri svimjihyli í Nólsoy fyri dansi, tombola og 21-spæli.

Men vóru veðurgudarnir blíðir, tá ið ovastevnan varð hildin í allar fagrasta veðri, vóru teir ikki so blíðir seinasta leygarkvøld, tá ið seinasta skotið í samband við ovastevnuna skuldi latast av.

Ætlanin var at hava dansin í tjaldinum í skúlagarðinum, men hesin varð fluttur í Royndarhúsið.

Bólkurin, Feed Back úr Nólsoy, spældi, men í fólkatali kundi hetta kvøldið á ongan hátt samanberast við dansin á ovastevnu, tá ið meira enn 800 fólk dansaðu og hugnaðu sær í tjaldinum fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

Vit hava frætt úr Nólsoy, at so gott sum eingi avbygda- ella býarfólk vóru har úti seinasta leygarkvøld eftir stuðulssvimjingina, og tí var gott pláss hjá teimum sum vildu dansa í Royndarhúsinum.

Veðrið var einki serligt, og tí fekst heldur ikki tað stóra burtur úr tombola og 21-spælinum, sum stuðulsnevndin skipaði fyri hetta kvøldið.

Samanlagt eru nólsoyingar tó meira enn fegnir um úrslitið av ovastevnuni.




Í morgin, leygardagin hava vit opið frá kl. 11.00-17.00

Í hesum sambandi hava vit nógv góð brúktbilatilboð m.a. hesi

Prísirnir eru áðrenn avsláttur

| | | |
|---|---|---|
| Citroen Xsara 1,9TD<br>km. 120.000, árg. aug. 1997<br>121.000,- | Mitsubishi Carisma 1,6GL 5h<br>km. 64.000, árg. mars 1997<br>95.000,- | Mitsubishi Galant 1,8 GLS<br>km. 186.000, árg. des. 1990<br>42.000,- |
| Citroen Xantia 1,8i 16V<br>km. 63.000, árg. okt. 1996<br>112.000,- | Mitsubishi Carisma 1,6GL<br>km. 81.000, árg. okt. 1996<br>85.000,- | Ford Sierra 2,0i CLX 4h<br>km. 110.000, árg. nov. 1991<br>45.000,- |
| Citroen Xantia 1,9TD stc SX<br>km. 45.000, árg. mars 1999<br>160.000,- | Mitsubishi Lancer 1,5 GLXi 5H<br>km. 145.000, árg. mai 1992<br>48.000,- | Hyundai Accent 1,3 LS 5H<br>km. 65.000, árg. feb. 1999<br>75.000,- |
| Mitsubishi Galant 1,8 GLSi<br>km. 150.000, árg. mai 1992<br>37.000,- | Mitsubishi Lancer 1,3 4h<br>km. 28.000, árg. aug. 1998<br>112.000,- | Jeep Cherokee 2,5 TD<br>km. 80.000, árg. juli 1997<br>135.000,- |
| Mitsubishi L300 2,5D<br>km. 161.000, árg. juni 1994<br>70.000,- | Mitsubishi Galant 1,8 GLSi Sport<br>km. 150.000, árg. juni 1992<br>37.000,- | Mazda Demio 1,3 5h<br>km. 50.000, árg. feb. 1999<br>87.000,- |

Møguleiki er eisini fyri at royna nýggjar bilar

Vit hava fleiri aðrar bilar á goymslu

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo